# Vit eiga at siga sáttmálan upp

**Tað einasta rætta er at siga sáttmálan upp, sigur Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tá ið vit gera tvey ára sáttmálar við arbeiðsgevararnar, er tað tí at teir skulu sigast upp og dagførast, táið sáttmálaskeiðið er úti, sigur Ingeborg Vinther*

– Eg haldi, at tað er rætt at siga sáttmálarnar upp.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðafafelag.

Og tað fer Føroya Arbeiðarafelag eisini at gera. Sáttmálin við arbeiðsgevararnar gongur út 30. apríl og sostatt skulu samráðingar verða við arbeiðsgevararnar um nýggjan sáttmála.

Ingeborg Vinther sigur, at spurningurin er umrøddur á kjakfundi í Føroya Arbeiðarafelag og har var full semja um at sáttmálin skuldi sigast upp.

Tað var eisini semja um, at Føroya Arbeiðarafelag skuldi kanna møguleikan fyri at øll arbeiðarafeløgini í felag fara til samráðingar við arbeiðsgevararnar.

Ingeborg Vinther heldur, at tað er rætt at siga sáttmálan upp hvørja ferð.

– Vit gera tvey ára sáttmálar. Tað er tí at ætlanin er at hann skal sigast upp og dagførast, hvørja ferð eitt sáttmálaskeið er úti. Tá ið vit gera tvey ára sáttmálar, er tað sjálvandi tí at tað er ætlanin, at hann skal sigast upp, tá ið sáttmálaskeiðið er úti.

Ingeborg Vinther sigur, at tí hevur Føroya Arbeiðarafelag altíð sagt sáttmálan upp.

Ingeborg Vinther hevur ikki stórvegis viðmerkingar til at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag hevur gjørt av ikki at siga sáttmálan upp.

– Men tað kann tulkast sum eitt tekin um veikleika og tað kann verða óheppið, sigur hon.

Hon er heldur ikki samd í grundgevingini hjá arbeiðsmonnunum í Klaksvík. Formaðurin í felagnum heldur, at teir stúra fyri arbeiðsplássunum og at teir tí ikki vilja leggja trýst á lønina. Tað er orsøkin til, at teir ikki vilja siga sáttmálan upp.

– Sáttmálasamráðingar snúgva seg ikki bara um løn. Tað eru nógv viðurskifti í einum sáttmála, sum bøtast kunnu um og tað er ikki alt, sum kostar arbeiðsgevarunum so nógvan pening, sigur Ingeborg Vinther

Men hvørji krøvini verða frá verkamannafeløgunum hesuferð, veit Ingeborg Vinther ikki, tí tað hava feløgini ikki viðgjørt enn.

### Øll ikki tikið støðu

Í Føroyum eru fimm arbeiðarafelag, sum hava sáttmálar við arbeiðsgevararnar: Arbeiðsmannafelagið og Arbeiðskvinnufelagið í Klaksvík, Arbeiðsmanna og Arbeiðskvinnufelagið í Havn og Føroya Arbeiðarafelag.

Sum sagt, fara menninir í Klaksvík ikki at siga sáttmálan upp. Hinvegin fer Føroya Arbeiðarafelag at gera tað.

Og í blaðnum týsdagin segði formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Hans Joensen, at limirnir, sum vóru møttir á aðalfundinum leygardagin, tóku fult undir við, at sáttmálin verður sagdur upp.

Í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag hevur aðalfundurin givið nevndini heimild at gera av um sáttmálin skal sigast upp, ella ikki. Men tað hevur nevndin ikki tikið støðu til enn.

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur ikki tikið støðu til sáttmálan enn, men forkvinnan, Vígdis Johannesen, væntar, at hann verður sagdur upp.

# Fingu 64 oyru minni um tíman

**Tað er ivingarsamt um hini arbeiðarafeløgini í Føroyum einaferð afturat fara at vera líka lagalig ímóti arbeiðsmonnunum í Klaksvík, sum tey vóru fyrst í nítiárunum**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er hent einaferð fyrr í nyggjari tíð, at Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ikki hevur sagt sáttmálan við arbeiðsgevararnar upp.

So vítt, vit hava fingið upplýst, var tað í 1992.

Tá samráddsut hini arbeiðarafeløgini um um nýggjar sáttmálar og úrslitið var, at tey fingu 64 oyru afturat um tíman.

Sostatt var avleiðingin fyri arbeiðsmenninir í Klaksvík, at teir fingu 64 oyru minni um síman, enn hini verkafólkini í landinum fingu og tað máttu teir liva við, ti, samráðingar vóru aftur.

Tá ið samráðingar so vóru aftur, spurdu arbeiðsgevararnir hini feløgini, um tey høvdu nakað ímóti, at Klaksvíkingar fingu eina eyka lønarhækking upp á 64 oyru um tíman, so at lønin hjá øllum verkafólkum varð tann sama.

Tað góðtóku hini feløgini tá.

Feløgini vilja ikki siga, hvørja støðu tey høvdu havt til hetta einaferð afturat.

Men keldur í fakfelagsrørsluni dylja ikki fyri at tey taka avgerðina hjá Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag sum ein knív í ryggin á arbeiðararørsluni.

Tí gera tær greitt, at verður úrslitið av samráðingunum í vár, at hini fakfeløgini fáa eina lønarhækking, er tað ógvuliga ivingarsamt um tey fara at góðtaka tað einaferð afturat at Arbeiðsmenninir í Klaksvík næstu ferð fáa eina eyka lønarhækking fyri at allar lønirnar skulu vera javntstillaðar.

# Vilja hava frið í eitt ár afturat

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag fer ikki at krevja lønarhækking frá arbeiðsgevarunum í ár. Tvørturímóti hevur felagið gjørt av, at sáttmálin skal ikki sigast upp**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Limirnir í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag stúra fyri arbeiðsplássunum. Tí gjørdu teir av at sáttmálin skal ikki sigast upp, sigur Kristoffur Olsen. Sjálvur heldur hann at tað er óheppið, at sáttmálin ikki verður sagdur upp*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

Nú nærkast aftur tíðin, tá ið arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarar fara at samráðast um nýggjan sáttmála.

Men tað er longu nú greitt, at í ár fáa arbeiðsgevararnir ein trupulleika minni at hugsa um.

Sáttmálarnir ganga út 30. apríl. Higartil er tað bara Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur givið nevndini undirtøku fyri at siga sáttmálan upp.

Men í Klaksvík er støðan heilt øðrvísi!

Klaksvíkar arbeiðsmannafelag hevur nevniliga tikið ta óvanligu avgerð, at tað fer ikki at siga sáttmálin við arbeiðsgevararnar upp. Sostatt er tað er longu nú greitt, at hesuferð sleppa arbeiðsgevararnir frá at samráðast við arbeiðsmenninar í Klaksvík um lønarhækking og aðrar ábøtur á sáttmálan.

Tað var á aðalfundi í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag leygardagin, at limirnir avgjørdu, at sáttmálin við arbeiðsgevararnar skal ikki sigast upp hesuferð.

Tað eru einir 280 limir í Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, men Kristoffur Olsen, formaður, sigur, at tað vóru ikki nógvir mans møttir á aðalfundi.

Hvussu fámentur aðalfundurin var, vil hann kortini ikki siga.

– Tað kann eisini gera tað sama, hvussu nógvir vóru á fundi, tí tað er meirilutin av teimum, sum møta á fundi, ið hevur avgerðina. Og leygardagin samtykti meirilutin, at sáttmálin skal ikki sigast upp.

– Og longri er tann søgan ikki, tí aðalfundurin er hægsti myndugleikin í felagnum og tað má nevndin halda seg til, sigur Kristoffur Olsen

Nú sáttmálin ikki verður uppsagdur, heldur hann fram í eitt ár afturat.

### Stúra fyri arbeiðnum

Flestu limirnir í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag arbeiða í fiskivinnuni.

Kristoffur Olsen skilti á limunum, sum vóru møttir á aðalfundinum í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, at teir huggsaðu nógv um at varðveita arbeiðsplássini.

– Eg skilti støðuna soleiðis, at menn stúra fyri gongdini í vinnuni. Onkur virki eru longu latin aftur og teir stúra fyri, at fleiri virki skulu fara sama veg.

Sostatt heldur formaðurin, at menn hava hugsað sum so, at teir vilja heldur varðveita arbeiðsplássi og arbeiðstímarnar, heldur enn at at krevja meiri í løn og leggja enn størri byrðar á arbeiðsplássi og sostatt økja vandan fyri at tað skal lata aftur.

Men hann heldur eisini, at tað kann hava havt sína ávirkan, at arbeiðsgevarar hava verið so dúgligir at vísa á, at tað er neyðugt at vísa lønarafturhald, tí annars versnar kappingarførið og so kann vinnan fara fyri bakka.

Hóast Kristoffur Olsen sigur, at nevndin má fylgja avgerðini á aðalfundinum. Men fyri egnu rokning heldur hann, at tað er óheppið, at sáttmálin ikki verður uppsagdur.

– Hetta kann elva til split í arbeiðararørsluni og sjálvur haldi eg, at tað er óheppið.

Hann sigur, at hóast lønarkrøvini kanska ikki blivu tey stóru, hevði tað verið rætt av Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag at tikið somu støðu sum hini feløgini og at sagt sáttmálan upp.

– Hetta kann somuleiðis enda við, at arbeiðsmenninir í Klaksvík koma at fáa verri løn enn øll hini verkafólkini í landinum, sigur Kristoffur Olsen.

# Nevndin tann sama

**Nevndin í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag er óbroytt eftir aðalfundin leygardagin**

AÐALFUNDUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin hevði Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag aðalfund. À fundinum stóðu tveir limir fyri vali, men teir vórðu báðir afturvaldir.

Í nevndini sita Kristoffur Olsen, formaður, Arthur Guðjonsson, næstformaður, Sigfríður Hansen er skrivari, Knút Guðjonsson er kassameistari og Dia Reyðberg er nevndarlimur.

Formaðurin er valdur beinleiðis, so Kristoffur Olsen heldur fram. Annars fer nevndin at skipa seg av nýggjum á fyrsta nevndarfundinum, sum verður í næstum.